Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Tunlar Norður um Fjall – spreinging og ferðsluljós

Spurningar:

1. Hvør er orsøkin til, at verandi farleið Norður um Fjall steingir, meðan sprongt verður fyri nýggju tunlunum?
2. Er grót dottið undan loftinum í verandi farleið orsakað av einari spreinging í nýggju tunlunum?
3. Vera tunlarnir stongdir hvønn dag í vikuni orsakað av spreingingini?
4. Hevur landsstýrismaðurin nakrar ætlanir um at tillaga ferðsluljósini til tunlarnar Norður um Fjall?
5. Hevur landsstýrismaðurin nakrar ætlanir um at sløkkja ferðsluljósini leygardag og sunnudag?
6. Hevur landsstýrismaðurin nakrar ætlanir um at sløkkja ferðsluljósini kl. 18.00 heldur enn kl. 20.00?
7. Hvussu nógvir bilar hava koyrt ígjøgnum tunlarnar í miðal mánadag, týsdag, mikudag, hósdag, fríggjadag, leygardag og sunnudag, eftir at ferðsluljósini eru sett upp, t.v.s. frá 16. juli til og við 24. november 2021?
8. Hvussu nógvir bilar koyrdu ígjøgnum tunlarnar í miðal mánadag, týsdag, mikudag, hósdag, fríggjadag, leygardag og sunnudag, áðrenn ferðsluljósini vórðu sett upp, frá 1. mars til 16. juli?

Viðmerkingar:
Landsverk boðaði tann 24.11.2021 frá, at tunlarnir Norður um Fjall steingja á leið tvær ferðir um dagin orsakað av spreinging í nýggju tunlunum. Linjuføringarnar liggja tætt at hvørji aðrari, og tí verða omanfyri nevndu spuningar settir, fyri at fáa greiði á, hvussu arbeiðið og spreingingarnar í nýggju tunlunum ávirka galdandi farleið.

Nú eru eisini góðir fýra mánaðir, síðani ferðsluljósini vórðu sett upp. Her er áhugavert at síggja, um talið á bilum er broytt á hesari farleiðini, og um landsstýrismaðurin ætlar at tillaga ferðsluljósini.

Á Løgtingi, 25. november 2021

Steffan Klein Poulsen